UTTAN ÚR HEIMI

## Skal ikki henda aftur

Amerikanska senatið samtykti fyrrakvøldið umfatandi broytingar í vallógini, sum skulu forða fyri, at hurlivasin á forsetavalinum fyri tveimum árum síðani skal endurtaka seg.

Lógin heimilar stjórnini at lata teimum einstøku statunum 28 milliardir krónur, so teir kunnu keypa sær nútímans atkvøðutól. Pengarnir skulu eisini nýtast til at gera sjálva veljaraskrásetingina meiri einfalda.

Aftan á samtyktina varð lógin send George W. Bush, forseta, sum nú skal staðfesta hana.

Tað var serliga í statinum Florida, at óskil var í uppteljingini aftan á forsetavalið fyri tveimum árum síðani, og hóast myndugleikarnir har hava nýtt 240 milliónir krónur til nýggja útgerð, høvdu fleiri valdømi trupulleikar við uppteljingini, tá uppstillingarval var í Florida í síðsta mánað.

## Bróður ráðharrans meldaður

Norski skiparin Kåre Ludvigsen er meldaður til løgregluna í Tromsø, tí hann skal hava landað 17 tons av upsa uttan at hava givið veiðina upp. Hetta er í sjálvum sær ikki óvanligt í Noregi, men tað serliga við hesum máli er, at Kåre Ludvigsen er bróður norska fiskimálaráðharran Svein Ludvigsen.

Tað er fiskiveiðieftirlitið, sum hevur meldað Kåre Ludvigsen til løgregluna. Eftirlitið sigur, at trolarin "Guldringnes", sum Kåre Ludvigsen er skipari á, hevur landað 47 tons av upsa, men at skiparin bara gav 30 tons upp.

Tann meldaði skiparin vil ikki gera nakrar viðmerkingar til málið, tí hann hevur ikki sæð ákæruna. Svein Ludvigsen, fiskimálaráðharri sigur við tíðindastovuna NTB, at øll brot á reglurnar verða sektað, sama hvør tað er, sum brýtur tær.

## Kostar 2460 milliardir

Amerikanska stjórnin sleppur at nýta 2460 milliardir krónur til verjumál næsta ár. Tað hevur senatið samtykt eftir einum uppskoti hjá stjórnini.

Samanborið við galdandi fíggjarlóg veksa útreiðslurnar til verjumál 12 prosent, og so stórur hevur vøksturin ongantíð verið síðani tíðliga í áttatiárunum. Uppi í játtanini er eitt møguligt hernaðarátak ímóti Irak, sum er mett at fara at kosta millum 750 og 1500 milliardir krónur. Einar 60 milliardir krónur eru settar av til ta umstríddu rakettverjuskipanina.

Men Bush fekk illa alla ta játtanina, sum hann hevði biðið um til bardagan ímóti yvirgangi. Senatið skarvaði 10 milliardir krónur av uppskotinum hjá forsetanum, eftir at umboðsmannatingið hevði gjørt tað sama.

## Drap sínar starvsfelagar

Ein 56 ára gamal kanadiumaður gjørdist so frá sær sjálvum, tá hann misti arbeiðið sum leiðari á einari umhvørvisskrivstovu, at hann skjeyt tveir av sínum starvsfeløgum og síðani seg sjálvan.

Maðurin hevði arbeitt á umhvørvisskrivstovuni í tí lítla býnum Kamloop í landnyrðing úr Vancouver í 15 ár. Tá hann týsdagin fekk at vita, at hann var uppsagdur, fór hann beina leið til hús eftir einari byrsu. Síðani fór hann aftur á skrivstovuna og tók fýra fólk gíslar.

Tað eydnaðist 12 øðrum starvsfólkum at sleppa til rýmingar, og tá løgreglan seinni herjaði skrivstovuna, hevði maðurin skotið tveir av sínum starvsfeløgum og seg sjálvan.

# Útlendingar vóru uppi í bumbuálopinum á Bali

**Indonesisku myndugleikarnir siga nú, at tað vóru útlendingar, sum skipaðu fyri bumbuálopinum á Bali seinasta leygarkvøld. Samstundis er váttað, at spreingingin umborð á franska oljutangaskipinum "Limburg" var ein yvirgangsatsókn.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*



*Á Bali verður framvegis leitað eftir fólki, sum doyðu í bumbuspreingingini. Her eru tað avstralskir løgreglumenn, sum kanna tey oyðiløgdu húsini.*

Talsmenn hjá indonesisku stjórnini søgdu í gjár, at útlendingar vóru uppi í bumbuálopinum á frítíðaroynni Bali seinasta vikuskiftið. Tað er kortini greitt, at einstakir indonesar vóru eisini uppi í álopinum, og stjórnin sigur, at løgreglan og herurin hava fingið boð um at leita eftir teimum.

Myndugleikar í fleiri londum vilja vera við, at tann víðgongdi felagsskapurin Jemaah Islamiyah skipaði fyri álopinum á Bali, men indonesisku myndugleikarnir hava kortini valt at lata leiðaran í felagsskapinum, Abu Bakar Bashir, fáa frið. Eygleiðarar halda, at myndugleikarnir tora ikki at taka hann, tí tað hevði uttan iva elvt til umfatandi mótmæli frá víðgongdum muslimum í Indonesia.

Í gjár ljóðaði kortini, at myndugleikarnir í Jakarta umhugsa at rættarsøkja Bashir. Eitt samdøgur frammanundan søgdu teir somu myndugleikarnir, at Bashir var als ikki í Indonesia.

### Tað var yvirgangur

Myndugleikarnir í Jemen viðganga nú, at tað var ein yvirgangsatsókn, sum var atvoldin til spreingingina og eldin umborð á franska oljutangaskipinum "Limburg" herfyri.

Jemenski innanríkisráðharrin, Rashad al-Alimi, segði í gjár, at kanningar hava víst, at ein lítil bátur, sum var fermdur við spreingievni, hevði siglt á franska tangaskipið.

Franskir og amerikanskir myndugleikar hava alla tíðina hildið uppá, at tað vóru yvirgangsmenn, sum søktu at franska skipinum. Álopið kostaði einum bulgarskum sjómanni lívið.

# Krevja endurgjald fyri oljudálking

**Myndugleikarnir á Taiwan krevja, at eitt norskt tryggingarfelag skal rinda endurgjald, eftir at eitt skip fór á land á taiwansku strondini í fjør.**

OLJUDÁLKING
*Árni Joensen:*

Taiwanski staturin krevur, at norska tryggingarfelagið Gard Services skal rinda 70 milliónir krónur í endurgjaldi, tí eitt skip, sum var tryggjað hjá norska felagnum, fór á land og dálkaði ein part av taiwansku strondini við olju.

Óhappið hendi í fjør, tá eitt farmaskip, sum var skrásett í Grikkalandi, fór á land á taiwansku strondini. Olja lak úr skipinum og rak inn á strondina, og norska tryggingarfelagið rindaði tá taiwansku myndugleikunum 13 milliónir krónur sum endurgjald fyri arbeiðið at fáa oljuna burtur.

Men hetta er ikki nóg mikið. Myndugleikarnir á Taiwan siga, at oljudálkingin hevur havt ringa ávirkan á ferðavinnuna, og tí vilja teir nú hava Gard Services at rinda 70 milliónir krónur sum endurgjald fyri mista ferðavinnuinntøku.

Leiðslan í norska tryggingarfelagnum hevur ikki tikið støðu til kravið enn.

# Norðurkorea hevur loyniliga kjarnorkuvápnaætlan

**Amerikanska uttanríkisráðið sigur seg nú hava fingið at vita frá norðurkoreanskum embætismonnum, at landið hevur havt eina loyniliga kjarnorkuverkætlan í fleiri ár.**

KJARNORKA
*Árni Joensen:*

Sambært uttanríkisráðnum í Washington komu norðurkoreansku embætismenninir við upplýsingunum, tá amerikanski sendimaðurin James Kelly var í Norðurkorea fyrr í hesum mánaðinum.

Samstundis sigur sjónvarpið CNN seg hava fingið at vita frá álítandi keldum í amerikansku umsitingini, at James Kelly varð ikki sørt skelkaður, tá hann undir vitjanini í Norðurkorea hitti Kang Suk-ju, sum er ein av teimum fremstu ráðgevunum hjá Kim Jong-il, forseta. á fundinum teirra millum skal Kam Suk-ju hava sagt, at sjálvandi hevur Norðurkorea eina loyniliga kjarnorkuvápnaætlan, og at landið hevur nóg mikið at plutonium til at gera í hvussu er tvær kjarnorkuløðingar. Sambært CNN legði norðurkoreanski embætismaðurin afturat, at tíðindi hansara áttu ikki at koma óvart á James Kelly, tí amerikanska stjórnin visti sjálvandi, at Norðurkorea hevur havt eina loyniliga kjarnorkuvápnaætlan í fleiri ár.

Amerikanska stjórnin sigur, at kjarnorkuvápnaætlanin hjá norðurkoreanum stríðir ímóti einum sáttmála frá 1994. Í hesum sáttmála bant Norðurkorea seg til at steðga øllum møguligum kjarnorkuvápnaætlanum, aftur fyri at USA lat landinum tveir smáar kjarnorkureaktorar. Hesir reaktorarnir kunnu ikki gera plutonium, ið verður nýtt sum spreingievni í kjarnorkuvápnum. Men norðurkoreanska stjórnin vil vera við, at sáttmálin frá 1994 er ikki í gildi longur.

Amerikanska uttanríkisráðið sigur, at tað ætlar at fáa eina friðarliga loysn á ósemjuni við Norðurkorea. Tað sama sigur tann suðurkoreanska stjórnin, og amerikanska uttanríkisráðið umhugsar møguleikan at lata vápnaeftirlitsmenn hjá ST fara til Norðurkorea at kanna viðurskiftini.



# Hevur ríkisfelagsskapurin nakra framtíð?



*Teir tríggir fólkatingslimirnir, sum mynda Norðuratlantsbólkin, Lars-Emil Johansen, Torbjørn Jacobsen og Kuupik Kleist.*

RÁÐSTEVNA
*Jan Müller*

Hósdagin 31. oktober verður stór ráðstevna á Christiansborg. Heitið fer ráðstevnuna er "Hevur ríkisfelagsskapurin nakra framtíð?". Tað er Norðuratlantsbólkurin á Fólkatingi, sum skipar fyri einum orðaskifti um framtíðina hjá ríkisfelagsskapinum, samstarvið millum Danmark, Føroyar og Grønland og leiklutin hjá teimum norðurlendsku limunum á Fólkatingi. Fundin er opin fyri øllum, sum hava áhuga fyri hesum viðurskiftum, men vendir sær serliga til grønlendingar og føroyingar, sum lesa í Danmark. Fundurin verður í felagssalinum á fólkatingi.

Við á ráðstevnuni verða næstformaðurin í fólkatinginum, Svend Auken, Henriette Kjær, almannaráðharri, Høgni Hoydal, varaløgmaður, komandi formaðurin í Siumut (verður valdur seinni í hesum mánaðinum), Josef Motzfeldt, formaðurin í Inuit Ataqatigiit, Bogi Eliassen, sum lesur samfelagsfrøði í Århus, Aviaja Helms, løgfrøðingur og Henriette Berthelsen, psykoterapeutur. Hesi trý síðsnevndu sita í arbeiðsbólkinum undir Norðuratlantsbólkinum. Haraftrat luttaka liminir í Norðuratlantsbólkinum á Fólkatingi: Lars-Emil Johansen, Torbjørn Jacobsen og Kuupik Kleist.

Luttøkan er ókyepis sigur fyrireikararnir men tað er neyðugt at melda seg til í seinata lagi hósdagin 24. oktober á telefon í Danmark 33375410 millum kl. 10 og 14, á faxi 33375399 ella á teldupostadressu: lotte.symes@ft.dk. Fyrireikararnir siga, at fyrivarni verður tikið fyri broytingum. sí heimasíðuna www.nab.fo



*Christiansborg, har ráðstevnan verður hildin*

# Vánalig búskaparstýring og blokkniðurskurður merkja løgtingsfíggjarlógina

**Orðaskiftið um løgtingsfíggjarlógina fyri 2003 vísti greitt, at trupult verður at fáa javnvág í búskapin næsta ár eins og trupult verður hjá samgonguni at semjast um fíggjarlógina. Hesi viðurskifti fara Eysturoyar Javnaðarfelag og Samhald at viðgera á almennum fundi**

TÍÐINDASKRIV

Týsdagin 22. okt. kl. 19.30 skipa Eysturoyar Javnaðarfelag og Samhald (valfelag Sambandsfloksins í Eysturoy) fyri kjakfundi í Muntra í Fuglafirði, har løgtingsfíggjarlógin fyri 2003 verður viðgjørd. At leggja fyri í hesum kjaki hava feløgini fingið Magna Laksáfoss, búskaparfrøðing at geriða frá síni hugsan um búskaparstýringina hjá samgonguni – bæði núsitandi og tí undanfarnu.

### Politikarar gera sínar viðmerkingar

Eisini hava feløgini boðið umboðum sínum í fíggjarnevndini við á fundin. Vilhelm Johannesen, sum er fíggjarnevndarlimum fyri Javnaðarflokkin fer at siga sína hugsan og Johan Dahl, fíggjarnevndarlimur Sambandsfloksins, greiðir eisini frá, hvussu hann og Sambandsflokkurin meta útlitini fyri 2003.

### Vánalig búskaparstýring

Magni Laksáfoss hevur í blaðgreinum víst á, at tær báðar samgongurnar hava rikið ein vánaligan búskaparpolitikk og skírir bæði fíggjarlógina og búskaparstýringina fyri eitt makkverk.

### Blokkniðurskurðurin sæst aftur

Hóast samgongulimir ferð eftir ferð hava sagt, at blokkniðurskurðurin upp á út við 400 mió. kr. ikki hava nervað føroyska búskapin, sær hvørt mansbarn, at tað júst er hesin peningurin, ið væntar í fyri at fáa realistiskt fíggjarlógaruppskot.

### Kreativ fíggjarlóg

Andstøðutingmenn hava skírt fíggjarlógina fyri at vera kreativa. Samstundis sum inntøkurnar tykjast at verða yvirmettar, er greitt, at útreiðslusíðan er ógvuliga nógv undirmett – bæði beinleiðis og óbeinleiðis. T.d. eru fleiri lógarfestar útreiðslur als ikki tiknar við, eitt nú Norðoyartunnilin.

### Kann elva til samgonguslit

Formaður Javnaðarfloksins hevur beinleiðis víst á, at fíggjarlógarviðgerðin lættliga kann elva til samgonguslit, tí sera trupult verður hjá samgonguni at finna semjur um øll tey mál – bæði sparingar og lógarbundnar útreiðslur – sum hvør flokkur ynskir.

### Fundurin almennur

Øll hesi viðurskifti og onnur við í samband við løgtingsfíggjarlógina og ikki minst fíggjarnevndarviðgerðin verður sum sagt viðgjørd á fundinum í Muntra í Fuglafirði týskvøldið 22. okt. kl. 19.30. Fundurin er almennur standur í tíðinaskrivi frá Eysturoyar Javnaðarfelag og Samhald.